# Marknaðardagur í Gongugøtuni í Havn

Sunnudagin 24. mai frá kl. 13.00 – 17.00 skipar Margarinfabrikkin fyri marknaðardegi í Gongugøtuni í Havn. Endamálið við hesum degi er at skapa lív og hugna í miðbýin. Borð verða uppsett omaneftir Gongugøtuni, har fólk hava møguleika at selja t.d. gomul ting, brúktar bøkur, gomul klæðir, heimagjørdir prýðislutir o.a. Ætlanin er ikki at hava hoppiborg, karrusell, elastikkspring og líknandi. Leigan fyri hvørt borð er 250 kr.. Hesar 250 krónurnar fara í eina pulju, sum skal nýtast til spennandi upplivingar fyri børn og ung í Margarinfabrikkini. Peningurin, selt verður fyri, fær seljarin sjálvur. Í hesum tíðarskeiði verður Gongugøtan stongd fyri ferðslu.- Um tú hevur okkurt at selja, skalt tú senda ein mail til: fabrikkin@torshavn.fo Í mailinum skalt tú upplýsa, hvat tú ætlar tær at selja, og hvussu nógv borð tú hevur brúk fyri. Freistin at senda inn mail er mikudagin 20.mai, siga tey á Margarinfabrikkini.





*- Sjálv sølan um góðkenda uppboðssøluskipan er ikki hon, sum ger fiskin nakað serligt dýrari. Hetta er ein skipan, har fiskaseljarin veit, at hann fær peningin at kalla beinanvegin. Øðrvísi kann ganga, tá selt verður til útlendskar keyparar, sigur Kári Hansen, sum gjøgnum árini hevur selt nógvan fisk uttanlands*

## Nógvir snýttir

Av royndum sigur Kári Hansen, at tað eru ikki so fáir fiskaseljarar og skip í Føroyum, sum hava brent seg við at selja ella landa uttanlands.

- Feskur fiskur á eitt nú skotska marknaðinum er "day by day" søla, sum hann rópar tað.

Hann vísir á, at tú kanst koma á marknaðin við fiskalast, tá marknaðurin er góður, og tá kanst tú gera eina góða sølu.

- Tú kanst koma, tá eitt "opið hol" er, men tú kanst saktanst eisini koma dagin eftir ella nakrar dagar seinni og gera eina bummsølu.

Kári sigur, at tað eru ikki allir fiskakeyparar í útlandinum, sum eru líka erligir – fyri at siga tað pent.

- Sum fiskaseljari í Føroyum kanst tú saktans fáa lovað ein góðan prís, men tá samanum kemur, fært tú væl minni fyri fiskin. Í aðrar mátar kanst tú væl fáa ein góðan prís fyrstu og aðru ferð, men síðan fellir prísurin.

Hann sigur, at tað ikki er óvanligt, at keyparar hanga seg í eitt ella annað fyri at trýsta prísin.

- Tú fært kanska at vita, at fiskurin er ov smáur – ella at ein partur av veiðini er ov vánaligur, sjálvt um hann ikki er tað, leggur hann aftrat.

Kári sigur seg einki petti hava ímóti, at treytin við teimum 25%, sum skip kunnu landa uttanlands í hvørjum fjórðingsári, verður broytt.

- Hetta er ein marknaður, sum avmarkar seg sjálvan – alt eftir marknaðarviðurskiftunum, har fiskurin kemur.

Hann vísir á, at tað so sanniliga hevur útreiðslur við sær at selja uttanlands, bæði landingarútreiðslur, siglingarútreiðslur og mista fiskitíð.

- Sendir tú hinvegin fisk heilan av landinum, hevur hetta eisini sínar útreiðslur við sær, og umframt vanligu útreiðslurnar við landing, kassaleigu og flutningi, kanst tú heldur ikki vera vísur í, at tú fært kassarnar aftur. Tá hann hetta skjótt gerast rættiliga kostnaðarmikið, leggur hann aftrat.

## Góð skipan

Kári Hansen heldur, at Fiskamarknaður Føroya er størsta frambrot í føroyskari fiskivinnusøgu í nýggjari tíð.

- Eg haldi, at vit hava eina sera vælvirkandi skipan, sum ei heldur er serliga dýrkandi fyri tann, sum selir – ella keypir og selir heilan fisk.

Hann sigur, at hava útlendingar so stóran áhuga fyri heilum føroyskum fiski, hava teir júst sama møguleika sum føroyskir keyparar at bjóða upp á fiskin, sum verður seldur á netinum. Vilja teir ikki vera við í kappingini um fiskin á okkara marknaði, er tað kanska tí, at teir hava okkurt í kvittanum. Orsøkin kann vera, at útlendsku keypararnir hava í kvittanum at "lumpa" føroyskar fiskaseljarar, sum vit ikki so sjáldan hava upplivað.

- Eg dugi onga meining at síggja í, at fiskimálaráðharrin nú skal leggja upp til at knúsa hesa skipan, ið hevur havt so stóran týdning fyri okkara fiskivinnu, bæði á sjógvi og landi.

Kári heldur, at úttalilsini hjá Jacobi Vestergaard eru púrasta ørvitiskent.

- Hvat vil landsstýrismaðurin í veruleikanum við ætlaðu broytingunum? Hetta má vera onkur fólkafloksætlan av einum ella øðrum slagi – og við eini ella aðrari "hensikt", heldur fyrrverandi reiðarin og fiskaseljarin.

## Smærri virkir

Við Fiskamarknaði Føroya fingu eisini tey smáu fiskavirkini í Føroyum ein møguleika at virka á jøvnum føti við tey stóru virkini.

- Hetta hevur havt stóran týdning fyri fleiri fiskaframleiðarar, sum hava vælrikin virki, ið hava havt stóran týdning fyri virksemi og fyri føroyska fiskaframleiðslu.

Kári Hansen heldur ikki, at tað verður nakar vinnari við avtøku av treytini um sølu um góðkenda uppboðssølu, tá óvirkaður fiskur verður útfluttur.

- Eg dugi soleiðis slett ikki at síggja, at ætlanin hjá Jacobi Vestergaard gevur nakra sum helst meining, og eg vóni ikki, at hann ger álvara av sínum ætlanum, ið kunnu fremjast bert við eini kunngerð, sigur fyrrverandi reiðarin og fiskaseljarin.